# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tólv húsasmiðir tikið prógv



Fríggjadagin 3. apríl fingu 12 húsasmiðir prógvini handað á Tekniska Skúla í Havn.

**Aftara rað f.v.:** Amon Djurhuus Ellingsgaard, Glyvrar, Bjartur Fríði Clementsen, Tórshavn, Erik J. Neshamar, Hoyvík, Gunnar H.H. Haraldsen, Tórshavn, H. Bogi J. Hermansen, Hósvík, Høgni Viderø, Hoyvík, Jákup Hentze Apol, Tórshavn.

**Fremra rað:** Jan Fríði á Regni, Toftir, Jens Pauli á Høgabóli, Miðvágur, Jón Jacobsen, Tórshavn, Martin Müller Poulsen, Sumba, og Petur Ísaksson, Sørvágur

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Andlát og jarðarferðir

**Marita Pálsdóttir Mohr**, ættað av Viðareiði, búsitandi í Havn, andaðist 2. apríl á Lágargarði, 84 ára gomul.

**Marita Mohr**

fer til gravar úr Havnar kirkju
týsdagin 7. apríl kl 14.00.

**Heri, Sigrún, Birita, Tordis,
Malan og Gunnar við familjum**

Tey, ið vilja minnast Maritu, kunnu lata Alzheimarfelagnum eina peningagávu, konto í øllum peningastovnum.

## Nýggj instrumental fløga

Týsdagin 7. apríl kemur ein instrumental fløga við 12 andaligum løgum út, har tað er vælkendi Victor Carlsen, ið spælir klaver til vælkend andalig løg. Fløgan hevur fingið heitið »Dreymar og veruleiki«.

Victor hevur verið virkin tónleikari í umleið 45 ár og hevur luttikið í mongum samanhangum, m.a. eisini á fleiri innspælingum, sum hava verið givnar út.

Tónalagið í fløguni er avslappað, og er ætlað at kunna njótast á ein stillføran hátt, og ikki minst boðskapurin í løgunum og upprunatekstunum eisini vísa á tað sama. Løg, sum t.d. »Førststående Gud«, »Crying in the chappel«, »Bert ein dag« og »Legg teg í Frelsarans armar« eru á fløguni.

Fløgan er partvís spæld inn í Amerika og í Føroyum. Noé Chapparro, versonir Victor, hevur samskipað tónleikin og latið hann í ein búna, sum sampakkar væl við sjálvt klaverspælið.

Eftirsum Victor fyri tveimum árum síðan fekk staðfest krabbamein, gjørdist støðan øðrvísi, tá hugsað verður um lívið og tilveruna, og tá settist lívið í annað perspektiv. Við hesum í huga og ta hjálp hann fekk frá Føroya Felag Móti Krabbameini, vil Victor gjarna stuðla felagnum fíggjarliga av søluni, sum tøkk fyri hjálpina.

Vónandi verður tikið væl ímóti fløguni og ynski og vónin er, at fløgan verður til signing hjá tí, ið lurtar, sigur Victor Carlsen.



*Týsdagin 7. apríl kemur instrumentalfløgan »Dreymar og veruleiki« hjá Victor Carlsen út*

**80 ára føðingardagur**

12. apríl verður Niels Pauli Mortensen, vanliga nevndur Pallun, Hvalba, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Dagurin**
**6. apríl. Sixtus**. Pávi. Hann hevði hetta starv í umleið 10 ár. Deyður ár 126.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*



## Eysturkommuna nýtt búmerki

Almenn móttøka var í nýggju hølunum hjá Eysturkommunu við Gøtugjógv fríggjadagin 3. apríl.

Í samband við móttøkuna varð nýggja búmerkið hjá Eysturkommunu avdúkað. Tað er samskiftisfyritøkan Sansir, sum hevur teknað nýggja búmerkið. Um búmerkið er at siga: Sólin rísur og sólin fer í kav – sólin sum er upprunin til alt. Hesi framúrskarandi fyribrigdi koma í Eysturkommunu. Sólin sæst rísa í Gøtu, og hon sæst fara í kav úr Leirvík. Búmerkið myndar sólina og vísir veg við síni kumpassrósu. Búmerkið strálar, tað er jaligt og opið. Tað er útfarandi og savnandi og tað er kraftmikið við síni egnu kjarnu, og her streymar nógv megið úr. Eisini er tað lætt at kenna.

Vit hava myndafrásøgn frá móttøkuni í blaðnum í morgin.

Eysturkommuna

*Nýggja búmerki hjá Eysturkommunu. Stavirnir eru svartir, og liturin á sólini er reyðgulur*